# Summarkapping 2007

# Flogbýurin sum fekk navn av flogkykti

**Sum bústaður telist Billund millum teir gomlu í Danmark, men navnið er nógv yngri og stavar - sera hóskandi - frá einum flogkykti**

BILLUND
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*




Tað eru mong, eisini danir, sum ikki vita, hvaðani býurin Billund hevur sítt navn, og tað eru eisini mong, sum spyrja - og tað av røttum, um navnið skal stavast Billund ella Bilund.

Á heimasíðuni hjá kommununi skrivar søgumaðurin Peter Jensen, at tað finnast tvey dømi um staðarnavnið Billund. og bæði eru í Jyllandi. Tað Billund, sum vit kenna í dag, er minst 450 ára gamalt sum staðarnavn, skrivar hann, men sum bústaður er staðið nógv eldri enn so, tí har eru funnur lutir, ið stava frá steinøldini.

Sum so mangir aðrir danskir býir hevur Billund sum uppruna í landbúnaðinum, og í skjølum frá 1780-unum sæst, at tá vóru átta bóndagarðar í bygdini. Bøndurnir dyrkaðu rug, men teir høvdu eisini neyt og seyð. Vanligt var, at ungir dreingir sótu hjá seyðinum fyri at verja hann ímóti teimum villu úlvunum, og soleiðis var tað til 1813, tá tann seinasti villi úlvurin bleiv skotin.

Men bøndurnir høvdu eisini eina aðra vinnugrein, og tað var at ala býflugur. Hetta var ein týðandi inntøkukelda hjá bøndrunum, sum fingu pengar burtur úr húnanginum frá býflugunum.

Býflugualingin var ein týðandi partur av gerandisdegnum í Billund til fyri umleið hundrað árum síðani, og í 1930-árunum fór hendan sermerkta vinnugreinin fyri bakka. Men tá hevði býflugan havt so stóran týdning fyri bygdina upp ígjøgnum øldir, at býurin fekk navn eftir hesum surrandi flogkyktinum.

Men hvussu stavast navnið so? Almenna stavsetingin er sum kunnugt Billund, men navnið er kortini ikki sett saman av orðunum bil og lund, sum stavsetingin kundi bent á. Út frá staðfestingini av, at navnið stavar frá býfluguni, skuldi tað bara havt eitt l, og í einum kongaligum skjali frá 1637 stendur eisini, at bygdin eitur Bilund.

Og tað hevði ivaleyst verið tað rætta.

### Løgd saman

Billund kommuna er ein av teimum smáu kommununum í Danmark, um støddin verður mett eftir fólkatalinum.

Tá Fólkatingið samtykti at skerja kommunutalið munandi við at leggja kommunur saman í størri eindir, slapp Billund kommuna heldur ikki undan broytingum. Hon varðveitti kortini navnið, men bleiv løgd saman við grannakommununi Grindsted frá 1. januar í ár. Í vídd er Billund kommuna 540 ferkilometrar, og nú 1. mai búðu 26.146 fólk í kommununi.

Sum í so nógvum øðrum kommunum í Miðjyllandi er Vinstri sterkur í Billund kommunu, og á seinasta kommunuvali fekk flokkurin meiri enn helmingin av teimum góðkendu atkvøðunum. Borgarstjóri er vinstramaðurin Ib Kristensen.

Í dag er Billund ein nútímans danskur býur við alskyns tilboðum innan útbúgving, ansing, mentan, almannaveitingar og á øðrum økjum. Men tað eru floghavnin og vinnulívið, sum hava sett býin á Danmarkar- og Evropakortið, og tað venda vit aftur til í komandi bløðum.



*Puntur nummar 15 av 23*




Uttan mun til hvar, og hvussu leiðin gongur, er tað umráðandi at fara tryggur avstað. Byrja ferðina hjá okkum, soleiðis at tú fært allan tín tørv nøktaðan og tryggur kanst njóta ferðina.

Kongabrúgvin, Postboks 329, 110 Tórshavn, Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari